# Býarskipanarnevndin - Álit

**Uppskot tilbyggisamtykt fyri Fugloyar kommunu - US-mál 20/00802**

Uppskotið snýr seg um at gera byggisamtykt fyri Fugloyar kommunu, bygdirnar Kirkju og Hættarvík.

Málið varð gjøgnumgingið og viðgjørt á fundum í Býarskipanarnevndini 5. november 2020 og 16. november 2020 (framhald av fundinum frá 5. november 2020).

Nevndin hevði hesar viðmerkingar:
Økisásetingarnar fyri neystini, t.v.s. 3.9.1 E1 økið Hattarvík, og 3.9.2 E2 økið Kirkja, eiga at byrja við setninginum: ***Økið verður lagt av til neyst, sum kunnu innrættast til frítíðaríbúðir.***

Nummerering 3.6 eigur at eita 3.5.2. og 3.7 eigur at verða broytt til 3.5.3., og síðan gera viðkomandi konsekvensbroytingar í tekstinum.

Fugloyar kommuna er spurd um orðingina um takhall á 20 stig og vinkulreising, tí nevndin metti, at teksturin eigur at verða greiðari hvussu hetta skal umsitast av kommununi.

Eisini hevði nevndin viðmerkingar til orðingina ***"síðsøgulig bygging"*** og til orðið ***"virkið"*** undir pkt. 3.10 Alment fríøki.

Svarið frá Fugloyar kommunu framgongur á myndini niðanfyri.

**3.7 Nýggjar útstykkingar.**
Húsini á niðaru síðu á vegnum skulu hava hava eitt takhall, sum er hægst 20 gradir. Gólvhæddin í miðhæddini kann í mesta lagi vera 30 cm oman fyri veghædd. Húsini á ovaru síðu á vegnum kunnu hava vinkulreising (upp til 45 gr.). Hæddin upp til hægsta punkt á bygninginum, undantikið skorstein, kann hægst vera 8,5 m yvir meðal jørðildi av liðnum lendi



**Eisini var viðmerking um,attørvur møguliga var á at nágreina *"síðsøguliga bygging"*.**

**Miðast skal ímóti, at útsjónd av húsum skal falla inn í verandi taka støði í síðsøguligari bygging.**

**Undir pkt. 3.10 Alment fríøki í uppskotinum til byggisamtykt mælti nevndin til, at orðið *"virkir"* verður nágreinað - hvat merkir virkir í hesum samanhangi ?**

Nevndin viðmerkti á fundinum, at tað kanska ikki framgekk nóg klárt, hvat mest loyvda hædd var fyri bygging á niðaru síðu á vegnum og mælti tí til, at mest loyvda hædd á bygging á niðaru síðu, bleiv nágreinað soleiðis:

- ***Onki punkt á húsinum eigur at verða hægri enn xx m omanfyri liðna veghædd ( í Klaksvík verður t.d. brúkt upp til 5,5 m).***

Uppskotið til byggisamtykt hevur ligið frammi í tveimum umførum, sí niðanfyri, og komu fimm mótmæli inn í fyrsta umfari og 3 mótmæli inn í seinna umfari. Mótmælini eru viðgjørd og svarað av kommununi.

**Niðurstøða:** Nevndin samtykti at viðmæla uppskotinum til byggisamtykt við omanfyri nevndu viðmkerkingum.

***Fakta:***
*Samtykt í Fugloyar kommunu: 17. august 2020*
*Ligið frammi alment tvær ferðir: 12. mai 2020 til 2. juni 2020 og 28. oktober 2019 til 20. november 2019*
*Sent UVMR til góðkenningar: 17. august 2020*
*Sent Býarskipanarnevndini: 21. augsut 2020*
*Mótmæli: 5 mótmæli í fyrstu atlogu og 3 í aðru atlogu.*

Býarskipanarnevndin, 19. november 2020

Gunnvá S. á Lofti, formaður

Ari Johanneson, skrivari